# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tann 22. februar í 2003 hevði Saddam Hussein hevði tosað við egyptar og var sinnaður at fara í útlegd*

*(El Pais)*

# Hesaferð kunnu teir ikki fjala seg

**Generalarnir í Burma nýta somu framferð sum fyrr, men hesaferð heldur heimurin eyga við teimum**



Í einari roynd at fjala seg fyri sínum egnu og umheiminum bygdu teir burmesisku generalarnir ein nýggjan høvuðsstað í frumskóginum. Generalarnir hildu, at har kundu teir fjala seg.

Men tá teir fyrradagin sendu hermenn og løgreglumenn eftir munkunum og hinum mótmælisfólkunum, sótu sjónvarpshyggjarar kring heimin og eygleiddu tað, sum hendi. Samstundis fekk umheimurin myndir, sum mótmælisfólk og eygnavitni høvdu tikið við fartelefon. Tann tøkniliga menningin hevði fingið generalarnar aftur, skrivar NTB.

### Farin frá?

Í morgun vildu summar tíðindastovur vera við, at tann ovasti generalurin í hernaðarstýrinum, tann 73 ára gamli Than Shwe, var farin frá, og at fólk høvdu sæð hann í floghavnini í Singapore.

Fyrrapartin skrivaði ein heimasíða hjá útlagnum burmesiskum tíðindamonnum, at kona Than Shwe og sjey av skyldfólkum hansara eru farin úr Burma til Laos. Sambært heimasíðuni er almenna frágreiðingin, at tey eru farin hagar at ferðast.

Eygleiðarar siga, at er Than Shwe veruliga farin frá og av landinum, kann tað rudda slóð fyri øðrum kreftum, sum eru fyri politiskum nýskipanum í Burma.

# 12,9 stig og so í bikini

Í gjár vóru 12,9 stig á Jan Mayen, og tað er heitasti dagur í ár. Fýra kvinnur arbeiða í løtuni á veðurstøðini á oynni, og tá hitamátarin í gjár fór upp um 12 stig, kvikaðu tær sær í bikini og so oman á sandin at sóla sær, skrivar Nettavisen. Ein av kvinnunum, Ninna Lødeng (á myndini), viðgongur tó, at hóast hetta var heitasti dagurin á árinum, var lotið kalt.



## STUTT SAGT

### Illveður trýstir oljuprís

Tá amerikanska veðurstovan í gjár boðaði frá, at eitt lágtrýst var farið at menna seg í Meksikanska Flógvanum og kundi enda sum illveður ella kanska sum ein tropisk ódn, fekk tað alt fyri eitt ávirkan á oljuprísin í USA. Í New York hækkaði prísurin næstan ein dollara fyri tunnuna og kom upp í 81,27 dollarar. Enn er kortini nakað eftir til metið frá síðstu viku, sum var 83,90 dollarar. Veðurmenninir siga, at ódnin fer helst fram við oljuleiðunum, men at hon sjálvandi kann taka eina aðra kós, tá saman um kemur.

### Serbi fekk 20 ára fongsul

Ein yvirmaður í serbiska herinum skal sita í fongsli tey næstu 20 árini fyri brotsverk undir borgarakrígnum á Balkan í nítiárunum. Krígsbrotsmannadómstólurin í Haag dømdi í gjár heryvirmannin 20 ára fongsul fryri at hava medvirkað til, at 194 fólk, sum høvdu leitað sær skjól inni á einum sjúkrahúsi í kroatiska býnum Vukovar í 1991, vórðu tikin av døgum. Dómstólurin segði, at heryvirmaðurin kundi havt forðað hópdrápinum. Ein annar heryvirmaður fekk fimm ára fongsul, men ein triði bleiv fríkendur.

### Ongar timburmenn

Gongst tað, sum nakrir amerikanskir og bretskir granskarar ætla, so kunnu fólk í framtíðini drekka alkohol uttan at nýtast at stúra fyri timburmonnum dagin eftir. Sambært Weekendavisen eru teir í ferð við at menna eitt evni, sum tekur allar óhepnar avleiðingar av at drekka alkohol. Evnið órógvar hinvegin ikki hinar egineikarnar hjá alkoholi, skrivar blaðið.